# út at koyra



## Citroën selur loyvi til Proton

Peugeot eigur Citroën, og teir samarbeiða við plattformum og komponentum, eins og teir eisini framleiða Citroën Evasion í samarbeiði við Peugeot 806, Fiat Ulysse og Lancia Zeta. Citroen selur framleiðsluloyvir til Proton bilverksmiðjuna í Malaysia.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

## Samstarva um nýggjan Lada

Ein nýggjur Ladabilur verður gjørdur í samstarvi millum General Motors í USA, Opel í Týsklandi, Valmet í Finlandi og Auto Vaz í Ruslandi.

Lada bilverksmiðjan, Auto Vaz, er størsta bilverksmiðjan í Ruslandi.

Bilurin verður bygdur yvir tann fyrsta Opel Vetra, sum varð gjørdur frá 1988 til 1996.

**Kelda: FDM Motor**

## Acura til Europa

Acura, ið er amerikanska luksusbilmerki hjá Honda, eru í ferð við at gera luksusjeepin MD-X, sum teir hava ætlanir um at selja í Europa – sum Honda jeepar næsta ár.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

# Audi A4 í nýggjum sniði



*Audi A4 kemur fyrst sum sedan. Seinni kemur hann sum stationvognur, coupé og cabriolet*

MAGNUS GUNNARSSON

Ætlandi kemur nýggi Audi A4 í oktober. Hetta verður fyrsti bilurin við nýggja plattforminum hjá VW/Audi, sum skal brúkast til tann komandi Passat og til toppmodellið hjá Skoda, sum kemur seinni.

Audi A4 kemur fyrst sum sedan. Seinni kemur hann sum stationvognur, coupé og cabriolet.

ESP stabilisatorskipanin verður standard útgerð.

**Kelda: FDM Motor**

# Nýggjur Vectra væntandi í 2002

Nýggi Opel Vectra, sum væntandi kemur í 2002, verður størri enn tann núverandi, breiðari longri og meira elegantur.

Eftir hesum bilinum at døma fer Vectra burtur frá teimum rundu linjunum til tær meira skørpu, men hann tekur seg væl út.

Tá nýggi Omega kemur í 2003, fær hann ætlandi sama plattform, sum Vectra – og forhjólstrekk.

**Kelda: FDM Motor**



*Vectra fer nú burtur frá teimum rundu linjunum til tær meira skørpu*

## Ford Prodigy skaðar umhvørvið sum minst



Ford hevur í mong ár havt eina P2000 ætlan, har teir byggja ein familjubil, sum skaðar umhvørvið minst møguligt.

Burtur úr hesi ætlan spurdust fleiri prototypur við navninum P2000. Nú vit eru komin til ár 2000, hevur bilurin fingið navnið Prodigy. Hetta er ein vælútgjørdur persónbilur við somu eginleikunum, sum ein jeepur.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

*Leingi hevur Ford arbeitt við ætlanini um at byggja umhvørvisvinarliga blini…*



# út at koyra



*At síggja til er Yaris Verso ein øðrvísi bilur, men hann er praktiskur og rúmligur*

**Myndir: Álvur Haraldsen**

# Toyota Yaris Verso vendur upp og niður uppá hugtøkini

MAGNUS GUNNARSSON

Nú kom so Verso, ið er ein størri Toyota Yaris á markn aðin – á tremur við spenn andi nýhugsan, heilt í smá lutir.

Yaris Verso ger upp við okkara hugsan um, hvussu ein persónbilur skal vera. Alt var einfaldari fyrr, tá visti tú, hvat var ein lítil ella stórur bilur. Toyota Yaris Verso hevur vent upp og nið ur uppá hesi hugtøk. Hetta er ein mini MPV bilur við mongum ymiskum møguleikum.

### Sum at sita í einum stórum bili

At síggja til er Yaris Verso ein øðrvísi bilur, men hann er praktiskur og rúmligur. Beinplássið framman og aftan er sum í einum stórum bili.

Baklúkan er hongslað á síðuni og gevur sera lága arbeiðshædd. Lampan undir loftinum í viðførisrúminum kann takast úr við at trýsta á ein knøtt og brúkast sum lummalykt. Tað mátti verið so líka til, at allir bilar høvdu hendan møguleika, tí tá vanligar lummalyktir liggja í bilinum, halda battaríini ikki leingi.

### Gerast um til vørubil

Instrumentborðið er tað sama, sum í Yaris. Í Verso situr tú hægri, og útsýnið er gott til allar síðir.

Eisini eru hillar uppi yvir sólskermunun, sum í vørubilum og lastbilum. Tað eru trý ymisk baksetur. Tvey í vanligari støðd í síðunum og eitt smalt í miðjuni. Tey uttaru setrini kunnu hvørt fyri seg leggjast saman og skumpast niður undir forsetrini, meðan tú mást finna pláss til tað mittasta, ella tú tekur tað úr bilinum. Dúrkið í bilinum verður tá heilt slætt eins og í einum vørubili.

Tá setrini eru sum vanligt, kann stólaryggurin í mittasta setrinum leggjast niður. Um tvey fólk sita á baksetrinum, kunnu tey hava eitt lítið borð við kopphaldara millum sín. Nógv smá rúm at leggja ting frá sær í eru í bilinum – eisini el-stikk til køliboksina.

### Eins høgur og breiður

Bilurin hevur 5 hurðar, er eins høgur og breiður, men tyngdarpunktið er lágt, og koyrieginleikarnir eru góðir við føstum vegtaki.

Yaris Verso er vælútgjørdur við t. d. »Multi-informatiónsdisplay«, ABS við EBD, dupult airbag, síðuairbag, nakkastuðlar, sum kunnu justerast, við øll setrini, el-síðurútar framman.

Yaris Verso hevur ein nýggjan 1,3 VVT-i motor við 86 hk., sami motorur, sum nú eisini fæst í tí vanliga Yaris.

Bilurin er tryggur at koyra í og vælegnaður til familjur við børnum.










TOYOTA

**Yaris Verso**

| | | |
|---|---|---|
| Motorur: | 1.3 l 4 syl. 16 V 86 hk. | |
| 0-100 km/t | 12.5 sek. | |
| Trekk: | Framman | |
| Dekk: | 175/65-14 | |
| Bremsur: | Skivur framman og trumlur aftan | |
| Stødd og vekt: | | |
| Longd: | | 386.0 cm |
| Breidd: | | 169.0 cm |
| Hædd: | | 168.0 cm |
| Eginvekt: | | 1000 kg |
| Totalvekt: | | 1500 kg |
| Viðførisrúm: | | 390 litrar |
| Bensinnýtsla: | | 15.6 km/l |
| Prísir: | | |
| Luna | | kr. 147.400 |
| Luna v/luksuspakka | | kr. 152.400 |
| Sol | | kr. 157.400 |

**Søluumboð:**
**P/F Reyni Service**
**Vegurin Langi**
**FO-188 Hoyvík**
**telefon 313040**


## Ellisakfør aðalfund

Felagið hjá teimum, ið dáma væl gamlar bilar og motorsúkklur, Føroya Ellisakfør, hevði aðalfund leygardagin.

Tríggir nevndarlimir stóðu fyri vali, og teir vóru allir afturvaldir.

Í nevndini í felagnum sita nú:

Brynjálvur Jensen, formaður
Búgvi Apol, næstformaður
Jákup Frants Larsen, kassameistari
Petur J. Johannesen
Jens Reinert.

Felagið varð stovnað í 1992


# BRÚKTIR BILAR

| MERKI | LITUR | ÁRG. | KM. | KR. |
|---|---|---|---|---|
| NÆSTAN NÝGGIR BILAR: | | | | |
| **Daewoo Nubira SX 1.6 Stationcar** Nýprísur: kr. 160.200,- | Gráur met. | 1999 | 12.447 | 129.800,- |
| **Daewoo Leganza CDX 2.0** Nýprísur: kr. 222.200,- | Reyður met. | Aug. 1998 | 27.000 | 185.000,- |
| **Daewoo Leganza CDX 2.0** Nýprísur: kr. 222.200,- | Svartur | Sept. 1999 | 11.000 | 199.000,- |
| ARBEIÐSBILUR: | | | | |
| **VW-Transporter LT 35 2.4 T. Diesel** (dupult kabina v/ last) | Hvítur | Feb. 1992 | 127.000 | 75.000,- |

Brúktbilasølan hjá
**P/f Esmar Simonsen**
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29

Sosialurin - 311820